TIL **ARBEIÐIS**



MYND: JENS KRISTIAN VANG

# MORGUNFÓLK VIÐ **SKAPANDI EVNUM**

– HÓAST EG **ARBEIÐI** ANNAÐ HVØRT VIKUSKIFTI, DÁMAR MÆR OMETALIGA VÆL AT ARBEIÐA SUM **KONDITTARI**, SIGUR **GRY HAAKENSTAD**, KONDITTARI Í BAKARÍNUM MYLNUNI Í HAVN



**TIL ARBEIÐIS**
Randi Jacobsen
randi@sosialurin.fo

Farið er um middag ein gerandisdag, og nokkso stilt er inni á bakarínum Mylnuni á Berjabrekku í Havn.

Tvær ungar kvinnur tuska aftur og fram. Hetta eru kondittararnir Gry Haakenstad og Ann-Margit Davidsen.

Inn ímillum steðgar Gry á at práta, men má so frá prátinum, hvørja ferð klokkan á ovninum ringir. Tað er nógv ferð á.

Tær byrja klokkan sjey hvønn gerandismorgun, og tá ið tær arbeiða um vikuskiftið, møta tær á midnátt ella klokkan 3-4, alt eftir, hvussu nógvar bíleggingarnar eru. Til vikuskiftið bíleggja fólk serliga køkur við róma, kransakøkur og lagkøkur.

Gjøgnum dagin gera tær øll møgulig sløg av køkum, í seinastuni eisini nógvar føstulávintsbollar.

Tær gera køkur til allar fýra handlarnar hjá Mylnuni. Gry hevur bara arbeitt í Mylnuni í tríggjar vikur.

– Tað mesta her er tað sama sum í Danmark, tilfarið, mannagongdin, og tað er líka nógv at gera. Køkuúrvalið er tó ikki heilt tað sama, sigur hon.

Gry arbeiddi í nøkur ár í Danmark, men hon tók av, tá ið henni varð boðið eitt starv í Noregi. Har var hon tó ikki leingi, tí fyritøkan kom í fíggjarliga trongstøðu.

Men Gry var so heppin at vera vinkona við Ann-Margit, kondittara í Mylnuni. Frá henni fekk hon at vita, at Mylnuni vantaði ein kondittara, og soleiðis bar tað til, at hon nú er í Føroyum.

### Arbeiðsgleði

Hon hevði verið fleiri ferðir, áðrenn hon nú kom til Føroya at arbeiða. Henni dámar væl í Føroyum og ætlar sær ikki avstað aftur enn á sinni.

### Hvørji eru krøvini til ein kondittara?

– Fyrst og fremst skal man vera morgunfólk, og man skal hava skapandi evni bæði til at finna uppá og duga at tekna ymist á køkurnar.

Gry hevur ongar trupulleikar við at fara upp tíðliga til arbeiðis, og hon møtir við gleði, tí henni dámar so væl arbeiði. Einasti vansin við vikuskiftsarbeiðinum er, at tá ið vinfólkini fara í býin eitt leygarkvøld, noyðist hon í song.

- Men tað ger ikki petti, tí mær dámar so væl hetta arbeiðið.

FAKTA **GRY**

**Navn:** Gry Haakenstad
**Starv:** Kondittari
**Besta við arbeiðinum:**
At skapa
**Starvstíð:** Fimm ár
**Staður:** Mylnan í Havn